Nakin linjuverji fekk leikbann

Altjóða fótbóltssambandið FIFA vil ikki finna seg í, at brasilski hjálpardómarin Ana Paula Oliveira hevur latið seg avmyndað í lítlum og ongum klæðum í brasilsku útgávuni av Playboy. FIFA hevur viðgjørt málið og givið Ana Paula eitt ára leikbann frá allari døming. Ana Paula hevur dømt týðandi dystir bæði heima í Brasil og í altjóða kappingum, men vakri hjálpardómarin fær onga uppgávu frá FIFA ella brasilska fótbóltssambandinum næsta árið.

Laudrup til til Getafe

Danski fótbóltsvenjarin Michael Laudrup er á veg til spanskan fótbólt. Nógv hevur verið skrivað og tosað um hetta seinast mánaðin, og fleiri feløg hava verið nevnd í hesum sambandi. Tað er tó líkt til, at Laudrup sjálvur vil sleppa til Getafe, har týskarin Bernd Schuster hevur fingið góð úrslit farna árið. Roknað verður við, at Schuster verður nýggjur venjari í Real Madrid, og so kann Laudrup takak yvir í Getafe.

Máltindarnir

formuladeildin

Amed Sylla Davy	B36	10
Paul Clapson	KÍ	9
Clayton Soares	B71	8
Rógvi Jacobsen	HB	8
Anderson Castilho	NSÍ	8
Fróði Benjaminsen	B36	7
Súni Fríði Barbá	AB	6
Pól Jóhannus Justinussen	GÍ	6
Jákup á Borg	HB	6
Magnus Olsen	B71	5
Gunnar Nielsen	KÍ	5
Alexander Johansen	Skála	5
Birgir Jørgensen	VB/S	5

Besti málskjúttin í Formula-deildini fær eftir kappingarárið handað gylta skógvin frá Thomas Dam ítrótti

1. deild

Andrzej Stretowicz	FSV04	13
Alexandro Castilho	B68	11
Jósup Henriksen	B68	11
Dánjal Hansen	B68	10
Tróndur Sigurðsson	HB	10
Adrian Joensen	LÍF	9
Sonni L. Petersen	NSÍ	9
Bartal Eliasen	ÍF	8
Jørgin Meitilberg	SÍ	8
Nenad Saric	ÍF	7
Jann Ingi Petersen	B68	6
Andreas Lava Olsen	LÍF	6

formuladeildin

Formula-deildin

		d	v	-	j	-	t	v mál	t mál	+/-	stig
1	B36	15	9	-	4	-	2	25	11	14	31
2	NSÍ	14	10	-	1	-	3	24	12	12	31
3	EB/S	14	9	-	1	-	4	24	15	9	28
4	HB	15	7	-	2	-	6	31	23	8	23
5	GÍ	14	6	-	4	-	4	22	25	-3	22
6	B71	14	5	-	3	-	6	24	24	0	18
7	Skála	14	5	-	2	-	7	16	23	-7	17
8	KÍ	14	3	-	3	-	8	22	23	-1	12
9	AB	14	2	-	4	-	8	18	28	-10	10
10	VB/S	14	2	-	2	-	10	12	34	-22	8

1. deild menn

		dystir	v	-	j	-	t	vunnin mál	tapt mál	mál-munur	stig
1	B68	15	13	-	1	-	1	48	13	35	40
2	FSV04	15	10	-	3	-	2	29	18	11	33
3	ÍF	15	8	-	4	-	3	37	15	22	28
4	LÍF	15	8	-	1	-	6	32	23	9	25
5	NSÍ	15	6	-	1	-	8	29	35	-6	19
6	TB	15	5	-	3	-	7	20	19	1	18
7	HB	15	5	-	2	-	8	24	32	-8	17
8	SÍ	15	4	-	3	-	8	19	28	-9	15
9	KÍ	15	3	-	2	-	10	18	40	-22	11
10	B36	15	2	-	2	-	11	15	48	-33	8

Spælið fór við vindinum

HB hugburðurin tóktist vera betri, men avrikið móti botnliðnum, sum tykist megna at geva øllum dygga mótstøðu, var ikki meistaraliði verdugt

VB/SUMBA-HB

Jóannes Hansen

Heðin Askham og Gunnar Mohr vildu hava gamla HB hugburðin fram á Vágseiði. Vinnara hugburðurin átti ikki at verið so langt burtur, tí tað var ikki minst hann, sum var orsøk til, at HB í fjør megnaði at stríða og spæla seg til meistaraheitið.

HB liðið royndi at stríðast, men teir megnaðu ikki at fáa bilbukt við VB/Sumba, sum rættiliga hevði latið seg í arbeiðsklæðini og avgjørt átti sín lut í stríðnum.

Serliga í 1. hálvleiki var lítið flótandi fótbóltsspæl at síggja. Karmarnir vóru ikki til tað. Tað var nógvur vindur vestur eftir vøllinum, og tað darvaði, so tað stóð eftir í.

Dómarin ivaðist í, um tað yvirhøvur vóru umstøður at spæla, men hann og liðformenninir báðir samdust um, at tað bar til at royna. At vindurin var nógvur, sást eitt nú aftur í, at eftir eina rúgvu av málspørkum frá Tróndi Vatnhamar fór bólturin út av vøllinum.

Eftir steðgin, táið VB/Sumba hevði ættina ímóti, var vindurin linkaður rættuliga fitt, og tá var meiri fótbóltsspæl at síggja, enn tað hevði verið.

Heimaliðið sat so rudduliga á øllum í 1. hálvleiki. HB var eina ella tvær ferðir í brotsteiginum frammanfyri Vlada Filipovic.

Í hinum endanum nýttist HB málverjin, Tróndur Vatnhamar, ikki at keða seg í hvassa vindinum. Heimaliðið hevði nógvar atsóknir, og Tróndur var sannur brandur. Størstu bjargingina framdi hann, tá ið sentrali miðvallarin Jákup Olsen royndi seg við rimmar skoti útifrá. Bólturin tóktist hava beina kós í málið, men Tróndur stórbjargaði.

Kolldømdi mál

Eftir steðgin var HB væl betri við, uttan at heimaliðið nakrantíð var undir trýstinum, sum teir í 1. hálvleiki høvdu havt á gestunum. Eftir steðgin spældu teir í HB seg til møguleikar. Vandamiklastu royndina hevði fyrrverandi VB/Sumba spælarin Mortan úr Hørg. Eitt vet frammanfyri miðstrikuna smekkaði hann til, bólturin brast í tvørtræið og niður í vøllin aftanfyri Vlada Filipovic, men linjuverjin helt ikki, at bólturin hevði verið innanfyri strikuna.

Í yvirtíðini endaði bólturin í VB/Sumba málinum, men dómarin kolldømdi. Christian Høgni Jacobsen hevði sneitt fleiri av, tá ið Jákup á Borg fekk fatur á bóltinum og sendi hann í málið. Jákup var rangstaddur. Um Christian Høgni sjálvur hevði havt skorað, so hevði talan ikki verið um rangstøðu. Spurningurin er tó, um Christian Høgni hevði havt møguleika at fingið fatur aftur á bóltinum.

Men tað hevði verið ov mikið av mótgongd fyri VB/Sumba, um HB í hesi uppgerðini var farið við øllum. Annan mikudag, tann 11. juli, hittast VB/Sumba og HB aftur á Vágseiði. Tá stendur finaluplássið í steypakappingini upp á spæl. Í tí dystinum verður HB frammanfyri 3-1 frá fyrsta bríksli.

FAKTA

NSÍ-EB/Streymur 1-1 (0-1)
0-1: Arnbjørn Hansen 25.
1-1: Hjalgrím Elttør 66.
Dómari: Ransin N. Djurhuus
NSÍ: Jens Martin Knudsen – Pól Thorsteinsson, Óli Hansen, Jóhan Troest Davidsen, Einar Hansen – Nenad Stankovic, Bogi Løkin (Justines R. Hansen, 78.), Sjúrður Jacobsen (Jann Martin Mortensen, 69.) – Jónhard Frederiksberg (Andy Olsen, 72.), Anderson Casthilio, Hjalgrím Elttør
Gult kort: Bogi Løkin
EB/Streymur: René Tórgarð – Brian Olsen (Gert Hansen, 25.), Egil á Bø, Marni Djurhuus, John Heri Dam – Hanus Eliasen, Bárður Olsen (Sorin Anghel, 82.), Ronnie Samuelsen, Símun Eliasen, Rafael Kwicienski – Arnbjørn Hansen (Hans Pauli Samuelsen, 69.)
Gult kort: Símun Eliasen, Egil á Bø, Marni Djurhuus, John Heri Dam

B71-Skála 0-2 (0-0)
0-1: Alexandur Johansen 47.
0-2: Slavisa Kaplanovic 76.
B71: Símun Rógvi Hansen - Eirikur Poulsen, Fabio Vieira, Anders Rasmussen, Johannes Jensen - Flavio Lucio Silva de Santana (Rasmus Nielsen, 87.), Wellintong Soares, Eli Hentze (Jónsvein Thomsen, 79.) - Magnus Olsen, Clayton Soares, Gudmund Nielsen (Símin Hansen, 63.)
Gult kort: Flavio Lucio Silva de Santana, Símin Hansen
Skála: Predrag Markovic - Teitur R.Joensen, Rúni Rasmussen, Milic Curcic, Bárður Danielsen – Debes Danielsen (Poul N. Poulsen, 67.), Levi Hansen, Pætur D. Jacobsen, Alexandur Johansen – Bogi Gregersen (Slavisa Kaplanovic, 58.), Obele O. Okeke (Jógvan G. Joensen, 78.)
Gult kort: Pætur Dam Jacobsen

VB/Sumba-HB 0-0
Dómari: Dagfinn Olsen
VB/Sumba: Vlada Filipovic – Dan Djurhuus, Suni úr Hørg, Dimitrije Jankovic, Birni Kærbeck (Dánjal J. Joensen, 62.) – Jónar Dahl, Jákup Olsen, Evrard Ble, Aco Pandurovic – Birgir Jørgensen (Teitur Tausen, 90.), Jón Krosslá Poulsen
Gult kort: Suni úr Hørg, Jón Krosslá Poulsen
HB: Tróndur Vatnhamar – Mortan úr Hørg, Hans á Lag, Rasmus Nolsøe (Poul Thomas Dam, 69.), Emil N. Leifsson – Ólavur í Ólavsstovu (Kári Nielsen, 75.), Rókur av Fløtum Jespersen (Páll M. Joensen, 82.), Milan Kuljic – Jákup á Borg, Rógvi Jacobsen, Christian Høgni Jacobsen
Gult kort: Milan Kuljic

B36-GÍ 4-0 (2-0)
1-0: Ahmed Davy Sylla, 23.
2-0: Mikkjal Thomasen, 45.
3-0: Mikkjal Thomasen, 52.
4-0: Hanus Thorleifsson, 87.
Dómari: Páll Augustinussen
B36: Jákup Mikkelen – Alex José Dos Santos, Herbert í Lon Jacobsen, Fróði Benjaminsen, Johan V. Gunnarson – Klæmint Matras, Hanus Thorleifsson, Mikkjal Thomassen, Ingi Højsted (Kenneth Jacobsen, 84.) – Bergur Midjord (Heini í Skorini, 60.), Amed Davy Sylla (Tummas Hans Rubeksen, 70.)
Gult kort: Alex José Dos Santos, Ingi Højsted, Herbert í Lon Jacobsen
GÍ: Geza Turi – Áslakur Petersen, Atli Gregersen, Niclas Niclassen, Erling Jacobsen – Sam Jacobsen, Poul Ennigarð, Sverri Jacobsen (Finnur Justinussen, 77.), Símun Louis Jacobsen, Magnus Skoralíð (Jónreid Dalheim, 68.) - Pól Johannus Justinussen (Poul Andrias Jacobsen, 79.)
Gult kort: Áslakur Petersen